# ARKITEKTAFELAG FØROYA

## Lógir

**§ 1. Navn**

Navn felagsins er Arkitektafelag Føroya.

**§ 2. Endamál**

Endamál felagsins er at menna ansin fyri bygging og fyri mannaskapaða umhvørvinum í Føroyum.

Endamálið er herumframt at virka fyri felags áhugamálum limanna.

**§ 3. Virksemi felagsins**

Felagið røkkur sínum endamáli gjøgnum egið virksemi, samstarv við onnur feløg og við møguligum limaskapi í yvirskipaðum yrkisfelagsskapi.

Tað kann verða latið upp í hendurnar á serskildum yvirskipaðum yrkisfelagsskapi at røkja áhugamál felagsins, millum annað eisini at taka við samráðingar-rættinum.

Felagið kann gera undantak fyri luttøkuni hjá einstøkum limi ella limabólkum í einum tílíkum yvirskipaðum felagsskapi. Hetta kann vera viðvíkjandi gjaldi ella luttøku annars.

Heimilað verður nevndini at taka neyðug stig í hesum sambandi og at bera tær útreiðslur, ið standast av slíkum yvirskipaðum felagsskapi.

**§ 4. Limir**

Rætt til at gerast limir hava arkitektar, búsitandi í Føroyum, við prógvi frá hægri almennum arkitektaskúla og føroyskir arkitektar búsitandi uttanlanda.

Herumframt kunnu fólk, sum í verki hava prógvað kunnleika, ið kann javnmetast við góðkenda almenna arkitektaútbúgving, verða boðin - eftir samtykt á aðalfundi - at gerast limir.

Limir, sum eru í meira enn eitt ára eftirstøðu, eru ikki valbærir og hava ikki atkvøðurætt.

Limir, sum eru í meira enn tvey ára eftirstøðu, kunnu bert varðveita limaskapin, um gjaldsavtala verður gjørd og yvirhildin.

Er limur strikaður orsakað av eftirstøðu, kann viðkomandi bert gerast limur aftur, um gjaldsavtala verður gjørd fyri eftirstøðuna. Verður gjaldsavtala ikki yvirhildin missur viðkomandi limaskapin aftur.

Nevndin ger av, hvørjar møguligar tænastur verða
veittir limum í eftirstøðu.

## § 5. Hvílandi limir

Fylgjandi hava møguleika at gerast hvílandi limir:

a) Arkitektar ið ikki eru í starvi.
b) Arkitektar ið virka innan øki, har felagið ikki hevur møguleika at umboða limin.
c) Arkitektar ið arbeiða uttanlands og ikki eru settir av føroyskum arbeiðsgevara.
d) Arkitektar ið farnir eru um pensiónsaldur og ikki arbeiða innan yrkið.
e) Arkitektar ið av øðrum orsøkum ikki arbeiða innan yrkið.
f) Lesandi á góðkendum arkitektaskúlum.

Nevndin tekur avgerðir viðvíkjandi hvílandi limaskapi.

Hvílandi limir eru ikki valbærir og havi ikki atkvøðurætt.

Nevndin ger av, hvørjar møguligar tænastur verða veittir hvílandi limum.

## § 6. Aðalfundur

Aðalfundurin er hægsta vald felagsins. Aðalfundur verður hildin á hvørjum ári í oktober mánaði og verður boðaður limunum skrivliga ella við almennari lýsing ikki minni enn 14 dagar undan fundinum.

Allar avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta. Til at samtykkja broytingar av lógunum krevst tó, at í minsta lagi helmingurin av teimum limunum, sum búgva í Føroyum, er á fundi. Er minni enn helmingurin á fundi skal boðast til nýggjan aðalfund, sum tá er viðtøkuførur, sama hvussu nógvir limir eru á fundi.

Á aðalfundinum ræður meirilutin av avgreiddum atkvøðum, sbr. tó § 9.

Skráin til vanligan aðalfund er hendan:

1. Val av fundarstjóra og fundarskrivara.
2. Frágreiðing frá farna árinum.
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi.
4. Val av formanni.
5. Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum.
6. Val av tveimum grannskoðarum.
7. Ásetan av limagjaldi.
8. Ymiskt.

Eykaaðalfundur verður hildin, tá ið nevndin metir tað vera neyðugt, ella tá ið helmingurin av limunum krevur tað. Fundurin verður boðaður skrivliga ella við almennari lýsing ikki minni enn 7 dagar undan fundinum og við skrá, sum er lýst í fundarboðunum.

## § 7. Nevnd

Felagið verður stjórnað av trímannanevnd, ið verður vald á aðalfundinum.

Formaðurin verður valdur á hvørjum ári, hinir nevndarlimirnir fyri 2 ár í senn. Av teimum, sum valdir verða á fyrsta aðalfundi felagsins, situr annar tó bara eitt ár, og verður við lutakasti gjørt av, hvør teirra skal fara frá.

Aftan á hvønn aðalfund skipar nevndin seg við kassameistara og skrivara. Annar teirra skal samstundis vera næstformaður.

Nevndarfundur er ikki viðtøkufører uttan so at nevndin er fult mannað.

## § 8. Gerðabók

Allir fundir, sum felagið ella felagsnevndin heldur, verða skrivaðar í gerðabók við frásøgn um tað, sum á fundinum varð viðgjørt.

Fundarfrásagnir verða undirskrivaðar av teimum nevndarlimum, sum á fundi vóru. Aðalfundarfrásagnir verða undirskrivaðar av fundarstjóranum og fundarskrivaranum.

Frásagnir frá aðalfundum og eykaaðalfundum verða sendar limunum.

## § 9. Lógarbroytingar

Uppskot til broytingar í felagslógunum skulu ganga um nevndina og viðgerast á vanligum aðalfundi.

Til broyting av §§ 2 og 4 stk. 1 og 2 og til at avtaka felagið krevst, at 3/4 av limunum er á fundi og at 2/3 av atkvøðunum eru fyri broytingina ella avtøkuni.

Til aðrar broytingar í lógunum krevst, at ein meiriluti av teimum, sum eru á fundi, atkvøður fyri.

Soleiðis samtykt á fundi í Tórshavn tann 18. juni 1981.

Broytt á aðalfundi tann 29. september 1994.
Broytt á aðalfundi tann 6. oktober 2000.
Broytt á aðalfundi tann 2. desember 2005.
Broytt á aðalfundi tann 25. mai 2008.
Broytt á aðalfundi tann 29. juni 2008.
Broytt á aðalfundi tann 24. november 2013.